

# Tann stóra umvælingin

**UMVÆLING** Um góð fýra ár kann Mikladals kirkja hátíðarhalda 100 ára dag sín. Í hesum døgum verður ein rættiliga umfatandi umvæling gjørd í kirkjuni av monnum hjá byggimeistaranum Hanusi Højgaard í Klaksvík. - Hetta var vist ein tiltrongd umvæling, sigur hann

Tekstur: Snorri Brend
*Myndin: Jens Kristian Vang*

**Mikladalur:** - Ja, hetta er, sum tú sært, eitt stórarbeiði, vísir Hanus á.

Tríggir mans eru til arbeiðis í kirkjuni. Teir eru allir upptiknir hvør við sítt, og ikki hoyrist mannamál hesa løtuna, orsakað av óljóði frá maskinum.

Tað er skjótt at staðfesta, at teir hava ikki ligið á teirri latu síðuni, síðani teir byrjaðu arbeiðið. Her er farið nágreiniliga og skilvíst fram.

Øll kirkjan innan er snøgt sagt avmonterað: Altarið er burtur. Onki sæst til nakran bonk. Sjálvt altartalvan er tikin niður. Á loftinum í erva er urgan dekkað av eini presending.

Alt er tikið sundur við kærleika til kirkjuna og fakið, tí alt skal setast saman aftur á júst sama hátt sum tað var áðrenn. Ein avbjóðing var prædikustólurin.

- Ja, tað var tað. Vit máttu simpelthen bara hiva hann upp frá gólvinum, soleiðis at vit kundu arbeiða í friði og náðum við gólvinum. Og beint nú er ein maður í ferð við at festa prædikustólin aftur í gólvið, greiðir Hanus Højgaard frá.

Eftir at málarin er sloppin framat og er liðugur við sítt verk, fara teir hjá Hanusi innaftur fyri at byrja uppseting av stólum og øllum tí, ið higartil hevur verið goymt burtur.

## Koyrast burtur

Tað er nakað fyri jól, at teir byrjaðu hetta stóra arbeiðið at umvæla kirkjuna, sum í síni tíð varð umbygd og umvæld fyri 96 árum síðani.

Tíðarinnar tonn hevur eisini slitið uppá hesa kirkjuna, og nú var komið so mikið langt, at okkurt mátti gerast - bæði av nýggjum og umvælast.

Menninir hjá Hanusi Højgaard hava tí, sum eitt av teimum stóru arbeiðinum, skift kirkjugólvið.

- Ja, gólvið var so mikið vánaligt, at tað mátti alt koyrast burtur, bæði undirsløg og timbur, greiðir Hanus frá.

Ístaðin hava teir bjálvað undir og hava haraftrat stoypt gólvhita í, og lagt nýtt gólv á. Hválvið og síðurnar eru eisini bjálvaðar.

- Í dag kanst tú siga, at her verður talan um eina heita kirkju.

## Liðugt

Lidnir eru nú einir tveir mánaðir, síðani Hanus Højgaard og hansara menn fóru undir teirra arbeiði.

Frammanundan tí var alt innbúgvið tikið niður og flutt oman í eini hús longur niðri í bygdini. Hesa tíðina hava tí gudstænastur verið hildnar í skúlanum í bygdini.

Enn er ikki ásett, nær arbeiðið skal verða liðugt innanveggja. Ætlanin er somuleiðis at gerast skal eitt fýrrúm og toilett uttanfyri.

- Ein umsókn um tað er farin til býráðið, sum fyrst má góðkenna ætlanina, vísir Hanus á.

*snorri@sosialurin.fo*